## Hermenn til Haiti

Trygdarráðið hjá ST hevur samtykt at senda 3.500 hermenn og løgreglumenn afturat til Haiti. Frammanundan hevur ST meiri enn 9.000 hermenn har. Ban Ki-moon, aðalskrivari, sigur, at hermenninir og løgreglumenninir skulu vera við til at tryggja lóg og landaskil og hjálpa bjargingarliðunum og teimum, sum hjálpa teimum neyðstøddu eftir tann harða jarðskjálvtan. Øll tey 15 limalondini í trygdarráðnum atkvøddu fyri uppskotinum um at senda fleiri hermenn og løgreglumenn til Haiti. Ban Ki-moon sigur, at samtyktin vísir, at heimurin stendur saman um at hjálpa Haiti.



# næstu ferð

heilan hóp av stuðulsbólkum kring landið og í egnum valdømi. Hetta kunnu bæði vera stuðulbólkar innanflokka, og felagsskapir, sum hava brúk fyri politiskum vælvilja í altinginum.

Alt hetta ger, at kvinnurnar standa ongantíð einsamallar, men hava eina rúgvu av fólkum, sum arbeiða fyri seg.

### Øðrvísi valskipan

Valskipanin í Íslandi er eisini soleiðis skrúvað saman, at fyri at sleppa høgt upp á uppstillingarlistan, mást tú fáa nógvar atkvøður á tí, sum verður rópt undanvalinum. Hetta valið verður hildið áðrenn veruliga altingsvalið. Av tí, at tey hava listauppstilling, er alneyðugt at koma høgt upp á listan. Hetta hava vit ikki í Føroyum í dag, tí her eru listarnir settir alfabetiskt upp.

Í flokkinum hjá Siv Friðleifsdóttir, Framsóknarflokkinum, hava tey valt eitt slag av kvotering, har sagt verður, at millum tey trý fremstu valevnini, skulu hægst vera tvey av sama kyni, og millum tey fremtu fimm, skulu í mesta lagi vera trý av sama kyni.

Annars er upp til flokkarnar sjálvar at avráða, um teir ynskja kvotering á listanum. Vanliga hava vinstravendu flokkarnir okkurt slag av kvotering, meðan høgraflokkarnir prinsippielt eru ímóti kvoteringum.

Siv Friðleifsdóttir metir, at føroyska skipanin eigur at vera ein fyrimunur fyri kvinnur. Um flokkarnir væl at merkja seta sær fyri at fáa nakrar sterkar kvinnur á listan og annars arbeiða miðvíst fyri at fáa tær valdar. Ikki minst undir einum valdømi. Tí, sum hon segði, kvinnur hava traditionelt nógv verri við at verða valdar á smáplássunum, har ein „høvdingi" vanliga fer avstað við sessinum. Hetta hevur eisini verið galdandi í útjaðaranum í Íslandi.

### Kvinnur velja kvinnuflokkar

Eitt áhugavert hon nevndi var, at Gallupkanningar vísa, at kvinnuligir veljarar velja flokkar, sum hava ein greiðan javnstøðuprofil. Í hesum sambandi vísti hon á, at á seinasta vali vóru 62 prosent av atkvøðunum til vinstraflokkarnar frá kvinnum, sum valdu kvinnur. Og tað er ikki einans umráðandi at hava góð kvinnulig valevni á listanum, men eisini, at mannfólkini í flokkinum signalera javnstøðuhugburð.

Sum hon tók til: mennirnir eru ofta mist líka feministiskir sum kvinnurnar í vinstravendu flokkunum. Og tað telur nógv upp hjá kvinnuligu veljarunum, sum tí heldur velja teir flokkarnar.

### Kvoteringar vinda upp á seg

Kvoteringar er vorðið eitt afturvendandi tema í javnstøðukjakinum. Kring okkum eru mong komin til ta niðurstøðu, at javnstøða er alneyðug fyri demokratiið, og tí er eisini neyðugt við kvotum. Hetta er hent, eftir at fólk hava viðurkent, at tað er eftir øllum at døma ikki nóg mikið at vera væl skikkað, síggja gott út, tosa á rættan hátt og sum heild at spæla við upp á premissurnar hjá monnunum.

Kvinnur eru og vera við undirlutan, og fyri at fáa rættað upp á skeivleikan verða kvoteringar settar í verk í eitt tíðarskeið, til fólk hava vant seg við, at kvinnur duga eins væl og menn.

Hetta hevur millum annað havt við sær, at tað nógvastaðni í grannalondum okkara er vorðið vanligt við kvoteringum á vallistunum. Eisini eru kvoteringar vanligar í sambandi við almennar nevndir og ráð, sum vit eisini kenna tað her úr Føroyum. Hini londini hava eisini kvoteringar í nevndunum í almennum partafeløgunum og feløgum, sum tað almenna eigur part í. Í Noregi eru tey farin so vítt sum at samtykkja eina lóg, sum áleggur privatum fyritøkum at hava javnstøðu í nevndum og ráðum.

Í Íslandi verður ein líknandi lóg helst samtykt um fáar vikur. Hava privatar fyritøkur ikki megnað at fingið í lag javnstøðu í nevndunum innan árslok í 2013, verður kvotaskipanin áløgd við lóg.

### Menningarlondini taka seg fram

Kring um í heiminum hava eisini alt fleiri lond sett í verk kvoteringar til tess at fáa kvinnuumboðanina í politikki upp. Hetta eru sum oftast lond, sum hava verið fyri stórum sosialum og fíggjarligum bakkasti, har „nýggir bollar skulu á suppuna".

Tí eru norðurlond als ikki einsamøll á toppinum longur, men hava fingið kapping frá londum sum Rwanda, Suður Afrika og Cuba.

Munurin á hesum londum og norðurlondunum er sjálvandi, at meðan menningarlondini hava „noytt" kvinnurnar inn við kvoteringum, hava hini norðurlondini vunnið sær pláss á toppinum við beinhørðum kvinnukampi seinastu 100 árini.

Men enn er langt eftir á mál til Føroyar, við teimum 15-20 prosentum, koma upp á síðuna av hinum Norðurlondunum.

### Mugu vilja hava kvinnur við

Tí var hetta eisini millum høvuðsboðskapirnir hjá Siv Friðleifsdóttir á fyrilestrinum: Føroysku flokkarnir noyðast at taka javnstøðu í nógv størri álvara. Teir mugu seta sær fyri at fáa fleiri kvinnur inn og gera eina miðvísa ætlan fyri, hvussu málið verður rokkið.

Her hava miðlarnir eisini ein part av ábyrgdini, eins og at kvinnurnar sjálvar og veljararnir mugu vilja hava kvinnurnar inn.

Sambært Siv Friðleifsdóttir verður alt hetta einans rokkið við miðvísum tiltøkum, at varðveita Demokratia, við kjaki og eggjan, politiskum fundum, stuðulsbólkum, networking við ungum og eldri, eisini tvørtur um floksmørk, og so ikki minst pengum...!

Í kvøld klokkan 19 heldur Siv Friðleifsdóttir fyrilesturin: Bankaskrædlið í eygum politikarans, har hon greiðir frá um íslendsku bankakreppuna. Fyrilesturin verður í Athøll í Norðurlandahúsinum.

### Toppskorarar í kvinnuumboðan í tinginum

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Rwanda | 56,3% |
| 2. | Svøríki | 47% |
| 3. | Suður Afrika | 44,5% |
| 4. | Cuba | 43,2% |
| 5. | Ísland | 42,9% |
| 6. | Argentina | 41,6% |
| 7. | Finnland | 41,5% |
| 8. | Niðurlond | 41,3% |
| 9. | Noregi | 39,1% |
| 10. | Danmark | 38% |
| 11. | Angola | 37,7% |
| 12. | Costa Rica | 36,8% |
| 13. | Spania | 36,3% |
| 14. | Andorra | 35,7% |
| 15. | Belgia | 35,3% |



*Í gjár hitti Siv Friðleifsdóttir føroyskar ting- og landsstýriskvinnur til ein bita heima hjá Bergtóru H. Joensen. Á myndini eru, umframt Bergtóru og Siv, eisini Annita á Fríðriksmørk, Rósa Samuelsen, Bjørt Samuelsen og Eyðgunn Samuelsen.*